# Høvdu allar møguleikar

- Tað var ikki í verjupartinum at tað kiksaði, segði venjarin hjá VÍF, Hjalmar Klein Olsen, tá vit tosaðu við hann eftir tapið móti Neistanum leygardagin

JÁKUP MØRK

Í steypafinaluni vóru tað mong, sum undraðust á, hvussu deydligt tað gjørdist á neistaliðnum, tá Áki Olsen og Heini Joensen vórðu mansvardir.

Helst vóru tað eisini fleiri, sum væntaðu, at VÍF leygardagin fór at nýta sama taktik, men so var ikki.

Hjalmar Klein Olsen greiður frá, at teir gjørdu av, at teir í fyrsta umfari skuldu royna at steðga stórskjúttunum við at fara tíðliga út í teir, og hetta heldur hann eisini eydnaðist heilt væl.

- Til saman fingu teir báðir átta mál, um brotskøstini ikki verða tald við, so í so máta eydnaðist taktikkurin hjá okkum, segði Hjalmar við Sosialin. Hann legði eisini afturat, at tað fyrst og fremst var teirra egna skyld, at vestmenningarnir ikki megnaðu at avgera dystin í fyrra hálvleiki.

Tað er eisini ein sannroynd, at vestmenningar høvdu góð kort á hondini í fyrra hálvleiki, men av ósketni lovaðu teir neistaliðnum inn aftur í dystin, og hetta máttu teir so eisini gjalda fyri.

Venjarin helt eisini, at yvirhøvur spældu hansara menn ikki nóg væl hendan dystin. Satt at siga var tað bert avrikið hjá Inga Olsen, sum venjarin metti sum nøktandi, og ein maður er dekan ov lítið, tá tað helst skulu vera sjey góðir leikarar á vøllinum í senn.

### Í aldudali

Seinastu dystirnar hevur annars verið líkt til, at vestmenningar hava verið í einum aldudali. Alt grundspælið taptu teir einans ein dyst, men síðani nýggjár hava teir tapt móti bæði StÍF og Neistanum, umframt at teir máttu lúta fyri Kyndli í steypakappingini.

Kanska er hetta ein avleiðing av, at venjingin hjá vestmenningunum byrjaði somikið tíðliga, men komandi vikurnar hevur liðið tó allar møguleikar fyri at koma úr aldudalinum.

Trý vikuskifti í slag skulu teir nevnliga royna seg móti teimum trimum botnliðunum, áðrenn teir í endaspurtinum skulu hitta liðini, sum løtuni liggja á øðrum, triðja og fjórða plássi í kappingini.

Megnað vestmenningar at vinna komandi tríggjar dystirnar, er lítið at ivast í, at teir standa í eini sera góðari støðu, áðrenn seinastu dystirnir verða leiktir. Hini oddaliðini hava øll onkra innanhýsis uppgerð at hugsa um í sama tíðarbili, og tískil kann væl henda, at vestmenningar hava minni trýst á sær, tá seinastu umførini skulu leikast.




**- Vit hava okkum sjálvum at takka fyri ósigurin leygardagin, sigur venjarin hjá VÍF, Hjalmar Klein Olsen**

Mynd: Álvur Haraldsen



**Talan gjørdist ongantíð um nakran spennandi dyst sunnudagin, tá Kyndil og Tjaldur hittust. Eftir at teir vunnu teir vunnu eina trygga leiðslu tíðliga í dystinum, sleptu Uni og liðfelagar hansara ongantíð takinum**

**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Vónin er ikki slept

Uttan nakað stórvegis hóvasták vant Kyndil burtur úr Tjaldur, tá liðini hittust sunnudagin, og enn hevur kyndilsliðið ikki mist alla vón um heiðursmerki hetta kappingarárið

JÁKUP MØRK

**Kyndil-Tjaldur**
**34-21 (15-9)**

Steypavinnararnir úr Kyndli, munnu hava hildið høvdið nakað høgt alla seinastu viku, og einki er at ivast í, at teir eisini hava havt allar hugsandi orsøkir til hetta.

Hondbóltur snýr seg tó um annað og meira enn bara steypakappingina, og sunnudagin kallaði gerandisdagurin aftur, tá Tjaldur var komið til Havnar.

Uttan iva var tað sera heppið fyri Kyndil, at talan sunnudagin var um eitt av veikaru liðunum í deildini. Ofta er tað jú soleiðis, at leikararnir hava hug til at dovna nakað, tá teir júst hava vunnið ein stóran sigur.

### Gjørdi sum teimum lysti

Tað var eisini líkt til, at kyndilsleikararnir vóru alt annað enn uppsettir, tá teir sunnudagin fóru á vøllin. Ferðin á spælinum var sera lág so at siga allan fyrra hálvleik, og uttan at nakað verður tikið frá Tjaldursliðnum, so var tað ikki orsakað av góðum spæli, at teir meginpartin av fyrra hálvleiki høvdu fatur í kyndilsliðnum.

Javna gongdin helt sær inn til tað restaðu góðir fimm minuttir av fyrra hálvleiki. Tá nýtti kyndilsvenjarin sítt time-out, og eftir hetta setti kyndilsliðið brádliga meira ferð á.

Seks mál á rað syrgdu fyri, at dysturin so at siga var avgjørdur, og í seinna hálvleiki hildu teir bara á fram, hóast ferðin ongan tíð gjørdist hin heilt stóra.

Tjaldursleikararnir høvdu eisini sæð, at dysturin í roynd og veru var taptur, og tí royndu teir als ikki at mutta ímóti, men lótu kyndilsleikararnar gera, sum teimum lysti.

Sostatt var ikki tað undirhaldsvirðið í dystinum, men onkrar góðar detaljur fingu fáu áskoðararnir tó at síggja, tá Hannis og Hans Áki royndu seg við onkrum smørtum skoringum.

### Bjarni út

Hóast Kyndil sostatt vann ein heldur léttan sigur, so munnu teir helst iðra seg um, at Bjarni Wardum fekk eitt heldur óneyðugt reytt kort, tá hann mest sum fyri seg sjálvan mutlaði nøkur orð, sum dómararnir helst ikki skuldu hoyra.

Oyruni vóru tó vakin, og tí mátti Bjarni ganga tungu leiðina út í skiftisrúmið, nakað áðrenn liðfelagarnir vóru lidnir at spæla.

Kyndil má sostatt vera stórskjútta sín fyri uttan komandi dystin, men tá hesin er móti H71, er helst væntandi, at Kyndilsliðið megnar at fáa stigini, uttan hjálp frá Bjarna.

Kyndilsliðið er nú bert fýra stig frá teimum trimum oddaliðunum, so hóast útlitini ikki eru av teimum allarbestu, so er liðið ikki heilt aftur úr siglt kortini. Úrslitini skulu tó laga seg sera væl, um tað skal eydnast teimum grønu at vinna seg fram á fremsta pláss, men so leingi møguleikin er til staðar, kunnu teir ikki heilt avskrivast.

Tjaldur sær hinvegin út til at fáa tað sera torført restina av kappingarárinum. Enn hevur liðið ongan dyst vunnið í grundspælinum, og megna teir ikki at vinna komandi vikuskifti, tá teir skulu royna seg móti KÍF, fer av álvara at síggja svart. Ein uggi man tað tó vera, at tað í løtuni ikki er líkt til, at nakað lið fer at flyta niður, men tað er so ongantíð stuttligt at liggja aftast.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Hannis Wardum 8 (1), Hans Áki Dahl Christiansen 8, Jacob Jónsson 7, Rúni Poulsen 5, Bjarni Wardum 3, Regin Petersen 2, Uni Wardum 1
Tjaldur: Sverri Justinussen 7 (3), Súni F. Johannesen 4, Mortan Hansen 4, Ragnar Olsen 3, Arnfinn Langgaard 2, Dia Lamhauge 1
**Brotskøst:**
Kyndil 1, Tjaldur 3
**Útvísingar:**
Kyndil 5, Tjaldur 4
**Diskvalifikatión:**
Kyndil 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar úr Neistanum:**
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



# Ioana fer eftir silvurmerkjunum

Í stórum pørtum av dystinum hevði Neistin eitt gott tak á vestmannagentunum, men sum ikki einaferð avgjørdi Ioana Rápa dystin til fyrimuns fyri VÍF



**Vestmannagenturnar hava havt sera gott tak á Neistanum hetta kappingarárið, og sunnudagin vunnu tær triðju innanhysis uppgerðina millum liðini bæði**

Mynd: Álvur Haraldsen

JÁKUP MØRK

**Neistin-VÍF 20-24 (11-10)**

Dysturin leygardagin var allar helst ein av teimum, sum hevði stóran týdning fyri, hvar silvurmerkini enda, tá kappingarárið er runnið.

Skal metast eftir hesum, er lítið at ivast í, at VÍF í løtuni hevur sera góð kort á hondini í silvurstríðnum. Takkað verið Ioanu Rápa, eydnaðist tað teimum nevnliga at fáa tvey stig norður aftur við sær, tá tær leygardagin vóru í Havn, har tær vitjaðu Neistan.

### Sera javnt

Fyrsta umfarið gekk annars sera javnt á. Hvørgin parturin vildi geva seg, og hóast spælið sum so ikki var nakað at reypa av, so gjørdi javna støðan sítt til, at nervin alla tíðina var til staðar.

Hjá VÍF var tað sum ikki eina ferð leikandi venjarin, Ioana Rápa, sum gjørdi um seg í álopspartinum. VÍF fekk tíggju mál fyrra umfarið, og av teimum fekk rumenin hjá teimum ikki færri enn sjey. Á mótstøðuliðnum var eisini ein rumeni at síggja, men hóast Ileana Manolescu er ein fínur leikari, sum hevur styrkt mundandi um neistaliðið, so megnar hon ikki á sama hátt at átaka sær ein avgerandi leiklut.

Helst hongur hetta eisini saman við teirri sannroynd, at fysiska styrkin hjá Ioanu er øgilig. Líka mikið hvussu mótstøðuleikararnir royna at forða fyri tí, so megnar hon aloftast at berja seg ígjøgnum verjuna, og fær hon skot á, er ikki lukkuligt at standa fyri.

Hóast nógvu málini frá vestmannavenjaranum, so megnaði Neistin kortini at fylgja við, og móti endanum av fyrra hálvleiki megnaðu tær at sleppa tvey mál fram um VÍF. Hetta var samstundis fyrstu ferð, at meira enn eitt mál var á muni.

### Skrædnaði brádliga

Seinna helmingin av dystinum gekk eisini sera javnt á at byrja við. Um tað kann sigast, at nakað av liðunum átti munin, so var hetta helst Neistin, sum alla tíðina hevði hug at halda nøsini framman fyri VÍF.

Miðskeiðis í hálvleikinum kom tó brádliga vend í. Eina løtu riggaði einki í álopspartinum á neistaliðnum, og í hinum endanum lá alsamt betri fyri hjá VÍF. Eftir lítlari løtu vunnu tær seg trý mál fram um neistaliðið, og líkt var nú til, at sigurin skuldi fara til útiliðið.

Neistakvinnurnar góvust tó ikki á hondum, og skjótt vóru tær aftur bert eitt mál aftan fyri VÍF. Hetta takið kostaði tó ivaleyst nógvar kreftir, og seinastu minutt-irnar av dystinum, kundu VÍF staðfesta sigurin.

### Satsaðu nógv

Sum nevnt, so var tað eina løtu miðskeiðis í seinna hálvleiki, at VÍF megnaði at vinna sær fyrimunin, men vóru tær eitt sindur óhepnar, kundi tað eins væl koppað hin vegin.

Fleiri av málunum hjá VÍF komu nevnliga eftir skjótálop, har bólturin varð tveittur langt fram, og sjálvsagt er tað ein góð dygd, at leikararnir dga at nýta hetta vápn. Tað skal tó leggjast afturat, at ofta var líkt til, at bóltarnir, sum vórðu tveittir fram, ikki vóru ætlaðir nøkrum ávísum leikara.

Satsingin við longu sendingunum varð tó væl eydnað, og var hetta onnur av orsøkunum til, at VÍF kundi fáa stigini við sær heim aftur. Hin orsøkin var Ioana Rápa.

Sum nevnt, so er VÍF sera væl fyri í silvurdystinum nú. Tær hava tvey stig fleiri enn Neistin og Kyndil, men hinvegin hava hesi liðini ein dyst til góðar. Komandi vikuna skulu bæði havnarliðini tó til Klaksvíkar at royna seg, og tá VÍF næstu ferð skal royna seg móti Tjaldur, er lítið at ivast í, at tey bæði stigini helst gerast til fýra, tá komandi vikuskiftið er runnið.

### Dysturin í tølum:

**Málskjúttar:**
Neistin: Katrin á Neystabø 7 (2), Ileana Manolescu 4, Mildrid Jacobsen 3, Inga Danberg 2, Marjun Jógvansdóttir 1, Gunnelyg Berg 1, Birita Wardum 1, Rúna Wardum 1
VÍF: Ioana Rapa 14 (3), Jacklin Durhuus 4, Óluvá Poulsen 2, Fríða Johannesen 2, Nicolina Joensen 1, Signhild Petersen 1
**Brotskøst:**
Neistin 2, VÍF 3
**Útvísingar:**
Neistin 3, VÍF 1
**Dómarar úr Kyndli:**
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

# Leitað aftur á slóðina

Høvuðsstaðarfeløgini, Neistin og Kyndil, hava nú bæði skift venjara á konufólkasíðuni hetta kappingarárið, og í báðum førum hava gamlir kenningar tikið við

JÁKUP MØRK

Fyrr í ár gjørdi kyndilsvenjarin, Flemming Raben, av, at hann ikki longur vildi sita við stýrsvølin hjá besta kvinnuliðið felagsins (hann varð ikki sagdur úr sessinum, sum vit skrivaðu í seinastu viku). Tað ferðina varð tað fyrst Bárður Johannesen og síðani Sophus Dahl Christiansen, sum tóku yvir í venjarasessinum. Báðir hava teir eina drúgva fortíð í Kyndli.

Tá Neistin leygardagin leikti móti VÍF, var eitt tað fyrsta ein legði til merkis, at Rene Kristensen ikki longur sat á skiftisbeinkinum hjá Neistanum. Í staðin var tað ein gamal kenningur, Christian Poulsen, sum gav leikarunum boð um, hvat og hvussu tær skuldu gera.

### Samstarvið riggaði ikki

Vit hava spurt okkum fyri hjá leikarum og leiðslu hjá Neistanum, og boðini eru so at siga einsljóðandi hjá báðum pørtum. Bæði Inga Danberg, liðskipari, og Jón Kragesteen, formaður í Neistanum, siga við Sosialin, at samstarvið millum leikarar og venjara ikki riggaði. Sum tað ofta verður tikið til uttanlands, so riggaði kemiin ikki, og tískil varð avgjørt, at Rene Kristensen skuldi sigast úr starvinum. Hann er tó framvegis virkin í felagnum, har hann hevur ábyrgdina av liðum í yngru deildum felagsins.

Seinastu nógvu árini hevur Christian Poulsen verið sera virkin í Neistanum, har hann hevur venjari hjá nógvum liðum gjøgnum ár og dag. Í ár hevur hann so tikið sær av gentur 16, og nú hevur hann so eisini fingið ábyrgdina av besta kvinnuliðnum fyribils.

Christian sigur sjálvur, at enn er einki avgjøt, um hann verður verandi venjari restina av kappingarárinum, men við tað at tíðin var somikið knøpp, játtaði hann at taka við fyribils.



**Beint eftir dystin leygardagin var lagið ikki av tí besta hjá nýggja neistavenjaranum, Christiani Poulsen**

Mynd: Álvur Haraldsen